


# FÁ NÝGGJASTU TÍÐINDINI

**frá Fjarðafestivalinum send á fartelefonina**

Øll sum melda seg til tænastuna eru við í lutakastinum um ein iPod frá Kall Handlinum, sum letur upp í Saltangará um stutta tíð.
Drigið verður mánadagin 7. september. Vinnarin fær beinleiðis boð frá okkum

*Lýst verður eisini á www.fjardafestival.com og á www.kall.fo*

Um tú ikki longur ynskir at móttaka tíðindi frá Fjarðafestivalinum kanst tú senda eitt sms-boð við tekstinum **STRIKA** til **560 560**




Tú rindar tó vanligan sms-takst tá ið tú meldar teg til tænastuna og við møguligari frámeldan. Annars er tænastan ókeypis.
Væntast verður ein lýsing send saman við tíðindunum.

**Toll- og Skattstova Føroya**

# *Starv sum løgfrøðingur*

Toll- og Skattstova Føroya er stovnur undir Fíggjarmálaráðnum, hvørs uppgáva er at fyrisita toll-, mvg-, kolvetnisskatta- og avgjaldslógirnar, inntøkuskattalógina v.m. og alla skuldarinnkrevjing hjá landinum.

Stovnurin hevur 140 starvsfólk.

Økisskrivstovurnar røkja raksturin.

Stýrið tekur sær av yvirordnaðari planlegging, stýrings-, eftirlits- og menningaruppgávum, av sambandinum við Toll- og Skattaráðið, aðalráðini og landsstýrið, og virkar sum ráðgevi hjá økisskrivstovunum í løgfrøðiligum og øðrum fakligum spurningum um toll, skatt, meirvirðisgjald, onnur avgjøld og innheinting.

Í Stýrinum starvast 25 fólk.

Lýsingin sæst eisini á heimasíðu okkara

www.tollskatt.fo

E-mail:

tollskatt@tollskatt.fo

Søkt verður eftir løgfrøðingi til Toll- og skattstovu Føroya, Stýrið, at seta skjótast til ber.

**Høvuðsuppgávur hjá fulltrúanum verða:**

- Løgfrøðiligir spurningar innan meirvirðisgjald, skatt, toll og onnur avgjaldsumráði, herundir eisini innkrevjing av almennari skuld
- at ráðgeva Toll- og skattstovuni kring landið í løgfrøðiligum spurningum innan umsitingarumráði stovnsins,
- at leggja til rættis kunngerðir, rundskriv og vegleiðandi ásetingar á skatta- og avgjaldsøkinum,
- at gera ummælir í kærumálum, dómsmálum, og
- at luttaka í lógarfyrireikandi arbeiði.

**Førleikakrøv**
Tann, sum settur verður, skal hava cand. jur. útbúgving. Viðkomandi skal hava áhuga í at arbeiða innan skatta-, avgjalds- og innkrevjingarøkið, góð samstarvsevni, vera fyrikomandi og arbeiðssamur/-som. Fyrimunur kann vera, um umsøkjari hevur arbeiðsroyndir innan løgfrøðina á skatta- og avgjaldsøkinum.

**Vit kunnu bjóða**
Eitt spennandi starv við nógvum avbjóðingum, sum samstundis er fakliga krevjandi. Møguleiki er fyri eftirútbúgving.

**Setanartreytir**
Lønar- og setanarviðurskifti, sum eru treytað av starvsroyndum og útbúgving, eru eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Búðskapar- og Løgfrøðingarfelagið.

**Setanarøki**
Núverandi setanarøkið er Stýrið, men fevnir annars um Fíggjarmálaráðið og stovnar undir tí.

**Nærri frágreiðing um starvið**
Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Birtu Biskopstø tlf. 352600.

**Umsóknir**
Skrivlig umsókn saman við avritum av prógvum, ummælum og upplýsingum um starvsroyndir, skal vera Toll- og Skattstovuni í hendi í seinasta lagi

**5. september 2006 kl. 12.00.**

Toll- og Skattstova Føroya
Stýrið
Postrúm 2151
FO-165 Argir

Lýsið
við
brúktum
bilum



**Sosialurin**
www.sosialurin.fo

# TIL SØLU



Vælhildin og sermerktur 31 fóts bátur, M/B "Skúvanes", við 306 hk Volvo motori verður seldur um nøktandi boð fæst. Báturin liggur í Vágsbotni, miðskeiðis á ytstu flótibrúgv.

*Tlf. 264454/314122*

# Kettlingur funnin

Svart/stríputur kettlingur funnin fríggjadagin 18. august. Hann er sera reinligur, kerligur og blíður.

**Tlf. 310687 eftir kl. 19.00**